

# Húsaófriður – gangur í gerandisdegnum

Í grannalondunum verða stór krøv sett til ljóð og akustikk í húsum og bygningum. Men í Føroyum er eingin slík lóggáva, og av tí sama hava vit nógvar flottar bygningar, har tað ikki er inniverandi fyri gangi

– Tað eru fleiri føroyskir byggiharrar, ið nýta donsku ella íslendsku lóggávuna ella leita sær serkøna hjálp, tá teir fara undir at byggja. Men eg havi eisini hoyrt søgur um, at summir bert byggja skjótt og bíligt, og at teir tí ikki hugsa so nógv um, hvørt tað verður liviligt inni í húsunum fyri larmi. Tað sigur Hallur Johannessen, sum er akustikari ella ljóðverkfrøðingur, og sum livir av at ráðgeva um ljóð og ljóðdemping.

## Ljóð kelda til strongd

Sum heild eru fólk lítið tilvitað um ljóð og akustik, tá tey skulu byggja ella umvæla sær húsini. Av tí sama eru fleiri dømi um, at tá húsini eru liðug og gerandisdagurin byrjar, so er ikki inniverandi fyri larmi.

Støðugt sjóð, ekkó ella djúpir tónar, ið skera ígjøgnum, eru alt keldur til irritatión, møði og strongd hjá teimum, ið dagliga skulu virka og vera í ganginum. Hetta veit Hallur Johannessen úr Havn alt um. Dagliga ráðgevur hann arkitektum og byggiharrum innan bygging og ljóð. Men sjálvt um hann veit alt um ljóð, so er tað honum ómøguligt at koma við generellum ráðum um, hvussu tað slepst undan óynsktum larmi.

-Tað ber ikki til at gera ein fasitlista yvir, hvussu tú kanst sleppa undan ringum akustikki. Tað eru nevniliga óendaliga nógv ting, ið hava ávirkan á hvussu ljóðið verður. Men tilfarið og innrættingin spæla ein stóran leiklut, greiðir hann frá.

## Dempað ella ikki dempað

Hallur skilir ímillum tveir pólar. "Dempað rúm", ið eru rúm, har nógvar flatur eru, ið kunnu absorbera ljóðið. Teppi, stórar, bleytar sofur, stórar gardinur, bókareolir og annað, sum er inni, hjálpir til at minka um larmin. Harafturat ber til at nýa serligt ljóðminkandi tilfar at byggja við, sum eisini gera rúmið dempað. Hin pólurin er "ikki dempað rúm". Hetta eru rúm, har ljóðið ikki verður absorberað, men verður hangandi í rúminum leingi, og tí kann elva til strong og møði. Her eru harðar og stórar flatur, so sum berir veggir, stór vindeygu, hurðar og tílíkt, ið ikki absorbera ljóðið.

Munurin er, at øll ljóð so sum prát, skramlan av stólum, gangur frá sjón- og útvarpinum larmar meiri í einum ikki dempaðum rúmið, tí ljóðið verður hangandi so leingi. Tað ger tað strævið at vera inni, og tunghoyrd og eldri fólk hava ofta hava trupuleikar av at hoyra, hvat verður sagt, tí ljóðið loypur saman, so orðini gerast óskillig.

Men tað er jú neyðugt við veggjum, vindeygum og hurðum, tá tú byggir. Spurningurin er tí, hvørjum tilfarið hesi neyðugu tingini eru úr, og hvussu tú innrættar húsini.

## Minimalistiskt ella liviligt?

Hallur sigur, at innrættingin hevur nógv at siga. Alt, sum er inni, hevur ávirkan á ljóðið. Hevur tú tí ein trupulleika við ljóði, so er tað helst lættasta loysnin at leggja eitt teppi á gólvi ella at fáa fleiri bleytar møblar inn.

Men tað finst eisini ljóðminkandi tilfar, ið veggir og loft kunnu klæðast við, um tú ikki ynskir at fylla tær húsini við teppum, møblum og bókum.

– Men tað er ikki bert tað, ið er inni, ið ávirkar. Hvussu rúmini eru skapað, spælir eisini inn. Stór rúm, har stova og køkur ganga út í eitt, og einki er, sum brýtur ljóðið av, hava ofta nógvan larm, vísir Hallur á.

– Og í húsum, har tað er opið uppundir tróðrið er vandin fyri larmi somuleiðis størri, tí høg rúm larma generelt meiri enn lág rúm.

So ynskir tú ein minimalistiskan stíl við stórum opnum rúmum, fáum møblum, stórum veindeygum og berum veggjum – ja so er kanska ikki so nógv at gera. Av og á mást tú ganga uppá kompromis. Ynskir tú ein minimalistiskan stíl – ja, so er ein náttúrlig avleiðing ofta, at tað verður gangur inni.

Hallur vísir á, at júst hesin spurningurin ofta ger tað torført hjá arkitektum og akustikarum at semjast. Arkitektarnir ynskja at skapa ein beran stíl, sum víst er flottur –men har verður bara ikki liviligt inni.

– Tað er tó ógvuliga ymsikt hvussu sárbær fólk eru fyri ljóði. Summi leggja einki í, um tað ekkóar ella sjóðar, meðan onnur als ikki tola tað, greiður Hallur frá.

## Løggeva seg frá strongdini

Í grannalondunum eru tey greið yvir, at ljóð hevur stóra ávirkan á flestu fólk, og tí er tað tikið við í bygningslóggávuna. Í Danmark skulu ávís krøv um ljóðviðurskifti verða hildin, tá bygt verður. Verður lóggávan ikki fylgd, skal tað bøtast beinanvegin fyri at minka um larmin, og harafturat verða bøtur lætnar til tann, ið ikki hevur gjørt sítt arbeiði til lítar.

Her er tað, at Hallur kemur inn í myndina. Sum akustikari er tað nevniliga hansara arbeiði at ráðgeva arkitektum og byggifrøðingum um, hvussu teir á skilabestan hátt kunnu tryggja forsvarlig ljóðviðurskifti. Bæði tá teir byggja nýtt, men eisini tá teir umvæla.

– Til dømis senda teir okkum tekningar av húsunum og eina frágreiðing um hvat tilfar teir ætla at nýta. Síðani rokna vit út, um ætlaninar fara at lúka lógarkrøvini um larm. Um vit síggja, at tað ikki fer at lata seg gera, skjóta vit aðrar loysnir upp, til dømis við at skifta okkurt tilfar um við okkurt annað, ella við at broyta tekningina eitt vet, greiðir Hallur Johannessen frá.

Um talan er um bygningar, ið skulu umvælast, so ger Hallur neyvar ljóðkanningar í bygninginum og ráðgevur so út frá tí hann finnur fram til.

– Tað eru krøv til ljóðviðurskifti í íbúðarblokkum, men eisini til dømis í kontórbygningum, skúlum

FAKTA

### Hallur Johannessen



- Hallur Johannessen úr Havn hevur valt sær ljóð sum lívsstarv.
- Í apríl í fjør varð hann útlærdur elektroverkfrøðingur við ljóði sum sergrein.
- Hann starvast nú sum ráðgevi hjá donsku fyritøkuni »Gade & Mortensen Akustik« í Keyp-mannahavn.
- Uppgávurnar spenna víða: alt frá at gera kanningar av, um ein ætlaður vegur fer at lúka ljóðlógina mótvegis tættastu grannunum til at ráðgeva um byggiætlanir - til at fylgja limum í operaorkestrum, fyri at tryggja, at teir ikki eru útsettir fyri meiri larm, enn ásetta hámarki